# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Loftrúm og mannarættindi

Í gjár 10. desember var altjóða mannarættindadagur. Í hesum sambandi hevur Amnesty International gjørt vart við nøkur viðurskifti viðvíkjandi mannarættindum, sum vit øll eiga at geva gætur. Tað eru í hesum døgum seksti ár síðan, at heimsyvirlýsingin um mannarættindi varð samtykt í ST. Hendan yvirlýsing gav íblástur til bardagan ímóti apartheid í Suður Afrika, hon hevur havt ein týðandi leiklut í batanum av fólkaræðunum í Eysturevropa, Latín Amerika, Afrika og Asia. Heimsyvirlýsingin hevur í nógvum londum verið við til at avtaka deyðarevsing, banna píning, fremja javnstøðu millum kynini og verja rættindi hjá børnum. Heimsyvirlýsingin hevur fingið menn og kvinnur um allan heim til at luttaka i bardaganum fyri rættvísi og javna fyri øll. Hetta er sjálvsagt bert at fegnast um.

Hinvegin eru tíverri nógv dømi um afturstig. Í bardaganum móti altjóða yvirgangi hava nógvar heimsins stjórnir avmarkað grundleggjandi borgarlig rættindi. Grefligasta dømið um hesa gongd er amerikanska lóggávan, sum loyvir brúk av píning og lóggáva í mongum europæiskum londum, sum loyvir myndugleikum at nýta upplýsingar, sum eru fingnar til vega við, at fangar eru vorðinir píndir, tortereraðir í londum, har slíkir barbariskir hættir eru loyvdir í rættarskipanini. Hesi afturstig fara sum frá líður at verða til óbøtandi skaða fyri okkara rættartrygd og rættarfatan. Hetta er eisini ein orsøkin til, at A.I. rópar varskó og ger vart við, at tað er neyðugt at endurnýggja skyldurnar hjá stjórnum og samfeløgum til at venda orðaleik til veruleika.

Eisini vit kunnu gera mun. Í næstum skulu løgting og landsstýri taka støðu til umsókn frá USA um at nýta føroyskt loftrúm til hernaðarlig endamál. Hetta merkir vanliga til flutning í sambandi við kríggið í Irak og til fangaflutning. Løgtingið hevur mælt frá at fara í kríggj móti Irak, og tí er hetta ein orsøk til at siga nei til yvirflúgving. Fangaflutningur snýr seg um at flyta fangar til lond, har torturur er loyvdur til avhoyringar av fangum ella til Guantanamo. Hetta er grovt brot á manarættindi og hartil eitt afturfall til ta svartastu miðøld. Her er við øðrum orðum talan um virksemi, sum Føroyar sum mentað og human tjóð als ikki kann taka lut í ella leggja navn til. Uttanlandsnevnd so væl sum løgmaður eiga tí at nokta USA at nýta okkara loftrúm til hernaðarlig endamál.

**Sosialurin**

## Rættingar um skuld, skatt og bústaðarpakka

Val



**HØGNI HOYDAL**
Tjóðveldi

**Tá fakta eru skeiv, kann ongin taka skilagóða støðu...**

Ein tann fremsta forðingin fyri skilagóðum orðaskifti og avgerðum í Føroyum, eru tær støðugu skeivu upplýsingarnar og tey skeivu uppáhaldini, sum verða endurtikin upp í saman – so fólk at enda kunnu trúgva teimum.

Orsøkin til hesa gongd er sjálvsagt, at tað hevur verið – og er enn – heldur reglan enn undantakið, at politikarar sleppa at skilmarka sonevnd "fakta" eftir egnum áhuga, heldur enn at grundgeva fyri avgerðum, sjónarmiðum og hugsjónum á einum rímiliga greinaðum og skilligum grundarlagi.

Bara sum eitt dømi: Heldur enn at grundgeva fyri einum uppskoti ella eini avgerð, ið hevur djúptøkna ávirkan á fólk og samfelag, so velur eitt tingfólk, ein løgmaður ella ein landsstýrismaður at koma við onkrum uppáhaldi um, hvat onkur annar hevur sagt og gjørt fyrr... ella at okkurt stendur í onkrum sáttmála ella onkrari lóg... ella at okkurt tal er so ella so.

**Ongin hildin til svars**
Og oftast er tað skeivt og verður ikki kannað. Í stuttum: Roynt verður at fjala vantandi grundgevingar, vantandi hugsjónir og vantandi politiskar ætlanir í onkrari tilvildarligari útlegging av "at soleiðis er veruleikin".

Vit politikarar sleppa at sleingja okkara útgávur av fakta í høvdið hvør á øðrum og út í luftina – og hvørjum skulu fólk trúgva?

Slíkum uppáhaldum eiga vit politikarar sjálvsagt at verða settir til svars fyri í almenna orðaskiftinum. Men tað hendir tíverri sera sjáldan. Og her eiga fjølmiðlar, serfrøðingar og fólk, ið annars hava serligt innlit í umrøddu málini, eina stóra ábyrgd.

Kundi sjálvsagt nevnt óteljandi dømi: Minnast fólk tildømis, tann sokallaða "Wiener-sáttmálan", sum varð brúktur sum grundgeving hjá okkara hægstu monnum sum forðing fyri at flagga við Merkinum í Reykjavík? Hvar fór hann?

Men lat meg bert nevna trý tey feskastu dømini um skeivar upplýsingar frá politikarum, sum eg tíverri hoyri endurtikin av fjølmiðlafólki og serfrøðingum sum staðfest fakta:

**I: Skuld:**
Jørgin Niclassen, formaður Fólkafloksins, hevur skrivað grein um, at landskassin nú er skuldarfríur og nýtir hetta sum grundgeving fyri skilagóðum búskaparpolitikki hjá síni samgongu.

Men hetta er skeiv og villleiðandi skriving. Skuldarstøða landskassans – altso ognir landskassans mótvegis skuldini – er ikki betrað undir hesi samgongu. Hinvegin varð skuld niðurgoldin í stórum árini undan og peningur spardur upp. Og fyri búskapin sum heild er skuldarstøðan mótvegis umheiminum vaksin munandi undir ABC-samgonguni. Hetta kan skjótt kannast og staðfestast uttan politiskan orðadrátt.

**II: Skattur:**
Samgongufólk tosa støðugt um ein skattalætta uppá 240 mió. hetta valskeiðið. Dimmalætting skrivar hetta sum fakta í eini grein mánadagin. Men er hetta rætt? Nei, sambært upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum sjálvum, er givni skattalættin hjá ABC-samgonguni tilsamans fyri land og kommunur omanfyri 400 mió. kr.!

Hevur nakar hildið avvarðandi politikarum til svars fyri hetta – ikki minst teimum flokkum, ið settu loftið á 240 mió. kr. sum grundgeving og umbering fyri at fremja skattalættan?

**III: Bústaðarpakki:**
Alt gott um, at Hans Pauli Strøm í allarseinastu løtu royndi at fáa bústaðarpolitiskar broytingar fyri tingið, sum lovaðar hava verið í fýra ár. Og í hvussu er lutaíbúðarfelagslógina er nógv arbeiðsorka løgd í.

Men kortini hevur landsstýrismaðurin sent hópin av tíðindaskrivum út um – og allir fjølmiðlar hava tosað um sum "fakta" – ein heilan "bústaðarpakka", sum skuldi vera lagdur fyri tingið, og sum tíverri skuldi detta burtur nú.

Men hevur nakar kannað, hvat var í hesum pakka – og um neyðugu lógaruppskotini vóru so klár og greið og liðug, sum landsstýrismaðurin og samgongufólk hava sagt?

Eg havi so bara sæð eina illa fyrireikaða leigulóg, eitt uppskot til samtyktar um Húsalánsgrunnin, har ongin lóg er klár, og nakrar broytingar í forsorgarlógini.

Uppskotini um fíggjarliga grundarlagið (rentustuðul, mvg-afturbering, skattalætta fyri privat útleiguvirksemi o.a.) vórðu ongantíð løgd fram – og sum skilst kundu tey ikki góðtakast á løgtingsskrivstovuni

So her vantaði alt tað fíggjarliga grundarlagið, sum als ikki var klárt. At rópa hetta ein "bústaðarpakka" tykist mær rættiliga langt frá sannleikanum. Í minsta lagi er talan um sera villleiðandi upplýsingar til almenningin, sum vit kortini helst fara at hoyra sum "fakta" í øllum valstríðnum komandi.

**Ávaring:**
Og nú má eg ikki gloyma at leggja herðslu á, at fólk eiga ikki at gloypa hesi mínari útlegging av málunum. Men kannið heldur sjálvi málið, og spyrjið tykkum fyri hjá fólki, ið ikki hava politiskan áhuga í ávísari útlegging av "fakta".

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.